ur, fyri at verða rættvísisgjørdur. Sjálvur kann tú einki gera.

### Sunnimuslimar og shiittar

Umframt smásektir eru tveir stórir bólkar av muslimum, sunnimuslimar og shiamuslimar.

Sunnimuslimarnir eru nógv teir flestu, o. u. 85 %. Teir eru ortodoksir og meta opinbering og trúarkunnleika at vera endaligan í Koranini saman við “sunna”. Sunna er siðvenja, t. e. frásøgnin um lív og levnað Muhammeds. Teir tykjast at vera tann hóvligi og pragmatiski parturin av islam.

Shiittarnir, sum tá Muhammed var deyður fingu sær Ali, dótturmann og systkinabarn Profetinum, til leiðara, halda at framvegis er gjørligt við hjálp frá serligum andaligum leiðarum at fáa beinleiðis vegleiðing av Gudi. Helst eru shiittar meira áleypandi enn sunnimuslimar. Áleið 15 % av øllum muslimum eru shiittar.

Stutt eftir at Salman Rushdi varð lýstur griðleysur av ayatolla Khomeini í Iran, varð hildin islamisk heimsráðstevna. Av fýratifimm limalondum tóku fýratifýra lond frástøðu til dómin, og lýstu hann ikki at vera í samsvari við islam. Iran, sum tók undir við dóminum, teir høvdu jú sjálvir felt hann, hevur shiittiskt prestastýri. Tað stóðu púra einsamalt ímóti restini av islamska heiminum..




*Pílagrímsrundferðin mynd Wikipedia*

### Islamisk upplýsingartíð

Islam hevði sína gulløld í Europa fyri áleið túsund árum síðani. Tá høvdu muslimarnir lagt undir seg meginpartin av iberisku hálvoynni. Córdoba, høvuðssætið hjá teimum, gjørdist størsti býur í Vestureuropa, og miðstøð fyri mentan og vísind. Jødarnir, sum vóru flýddir undan jagstran, fluttu aftur til kalifatið í Córdoba, og vóru við til at gera Córdoba til vitanarmiðdepil í Europa. Har búðu og arbeiddu muslimar, jødar og kristin lið um lið í sátt og semju.

Córdoba hevði millum 200.000 og 500.000 íbúgvar. Har vóru gøtuljós og almennar baðstovur. Húsini høvdu rennandi vatn frá akvaduktunum. Fleiri enn 10 bókasøvn vóru í býnum. Har varð sett á stovn fyrsta hægri lærdómssetur í Europa. Og kvinnur høvdu eisini atgongd til universitetið!

Tað tók kristna Europa nógv hundrað ár at koma so langt.

Muslimarnir komu við gittaranum, flamencodansinum, talvspælinum og teimum arabisku tølunum. Muslimarnir á iberisku hálvoynni uppfunnu kanska ikki so nógv sjálvir, men fluttu við sær tað, sum teir sjálvir høvdu tikið til sín frá øðrum mentanum. Úr India, úr Egyptalandi og úr Persiu.

Í Córdoba var eisini ein stórur umsetingarstovnur. Stórur partur av helenska mentanararvinum hvarv, tá bókasavnið í Alexandria brann. Men tað var so heppið, at nógv av hesum ritum vóru at finna á arabiskum bókasøvnum. Nú blivu tey umsett til latín av arabiskum lærdum og gjørdust aftur lutur av europeisku mentanini.

### Tollyndið var størri enn í dag

Tað er einki at taka seg aftur í, at islam í dag er plágað av fundamentalistum. Men hon er ikki einsamøll um tað. Kristindómurin hevur so sanniliga eisini verið plágaður av fundamentalismu og er tað í stóran mun enn tann dag í dag. Í meira enn 700 ár vísti islam, at hon saktans kann trívast lið um lið við aðrar religiónir. Í hjartanum á iberisku hálvoynni liggur býurin Toledo við halgidóminum Santa Maria la Blanca, sum fríggjadagar var islamsk moska, leygardagar jødisk synagoga og sunnudagar kristin kirkja. So stórt var tollyndið tá av hesum trimum religiónunum mótvegis hvørjari aðrari.

**Bókmentir**:
Koranin, týðing av K. V. Zetterstéen, Wahlstrøm & Widstrand, 2003
The Koran, , týðing av N. J. Dawood, Penguin Books, 1974
Karen Armstrong, Muhammed., Forum 2003
Helmer Ringgren og Åke V. Ström, Religionerna i historia och nutid, Verbum, 1978
Herman Lindqvist, Historien om Spanien, Bra Böcker, 1991



*Frá moskuni í Córdoba, mynd Wikipedia*

*Muslimsk skurðlæknaamboð frá 1100-talinum, mynd al-Zahrawis Kitab al-Tasrif*

